

Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum, hevur nú fingið nýggja nevnd í felagnum. Mynd: Jógvan H. Gardar

# David MacFarlane nýggjur formaður í Atlantic Petroleum

**Jógvan Hugo Gardar**

25.04.2015 - 12:52

Oljan.fo

Atlantic Petroleum hevði aðalfund í gjár, har raksturin og gongdin í felagnum farna árið bleiv viðgjørt. Árið hevur verið krevjandi, eins og hjá øllum øðrum feløgum í olju- og gassvinnuni, orsakað av lækkandi oljuprísum.

Í boðum til keypsskálan sigur felagið at tav eru gjørdar nakrar broytingar í nevndini. Tey sum stóðu fyri vali vóru Birgir Durhuus, Jan E. Evensen, Barbara Yvonne Holm, Diana Leo og David A. MacFarlane.

Í uppskotið til nýggja nevnd vóru hesi, ið eisini eru vald, David A. MacFarlane, Jan E. Evensen, Teitur Samuelsen, Jan Müller og Knud H. Nørve.

Nevndin skipaði seg aftaná aðalfundin, og formaður er David MacFarlane, meðan Jan E. Evensen er valdur næstformaður.